# Vælumtóktur ríkisumboðsmaður segði farvæl

MÓTTØKA

*Orð og myndir: Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Er hetta næstseinasti ríkisumboðsmaðurin okkara fíggjarmálaráðharri tosar við?*

Hon er væl umtókt millum politikkarar, Vibeke Larsen, og vøkur vóru orðini, hon fekk við sær í skjáttuna, tá hon segði viðskiftafólkunum farvæl, seinnapartin mikudagin í Amtmannsborgini á veg niður til Danmarkar, har hon skal vera amtmaður í Sorø.

Vit komu eitt sindur áðrenn og fingu stundir at hyggja okkum um bæði uttan og innan. Vakur er urtagarðurin og hevur tú ikki verið innangarðs, so hevur tú heldur ikki varhugan av hvussu stásiliga garðurin er anlagdur. Eitt slott í byggifrøðiliga fátæku Havnini. Og nú hava teir sandblást spekkingina, so tilhøgdi grótveggurin er sjónligur aftur. Tú sær hvørt meitlaslag og tevjarsveittadroparnar, sum hvør einasti av hesum túsundtals steinum, ið samanlagt eru Amtsmannsborgin, hava drukkið í seg. Føroyskt basalt vakurt tilevnað, hví hava vit ikki fleiri sovornar bygningar í landinum, ið einki annað er enn basalt, heilar tríggjar kilometrar niður í jørðina.

-Sandoyingar skóru torv til Amtmannsborgina og alt parkeringsøkið frammanfyri varð nýtt til at goyma torvið. Her gekk nógv torv, tí ovnur var í hvørjum rúmi og nógv skuldi til fyri at húsini flógv. Nú eru ovnarnir burtur og miðstøðuhiti er í øllum húsinum, sigur Vibeke Larsen, meðan vit standa á bonaðu gólvunum inni í stovuni.

Eg hyggi meg um. Vibeke dámar tónleik og onkur hevur forerað henni allan tónleikin hjá Bach. Tað er slett ikki so lítið. 153 fløgur, sum standa í einum kufferti í eini av stovunum. Útsýnið hevur einaferð verið gott, men nú sær tú antin Hafnia ella Cafe Natúr, líka mikið hvønn veg tú hyggur út.

Tey eru við at flyta. Maðurin er komin heim at hjálpa til. Hann er lærari í matematikk og bókmentum, serliga russiskum bókmentum. Hann lesir russiskt sum brent, men undirvísir ikki longur í russiskum, og tí hevur hann givið bókasavninum heilar 10 kassar við russiskum bókum, skrivaðar á russiskum, og bókasavnið var fegið um gávuna. Tey eru spent at flyta niður aftur og at fáa eitt familjulív saman. Og niðri bíðar eitt barnabarn, sum er komið í heimin, meðan Vibeka hevur verið ríkisins umboð í Føroyum.

Á borðinum í miðstovuni standa leskiligir canapeir, vín, øl og sodavatn. Alt bíðar, móttøkan skal byrja um eina løtu, og fráfarandi ríkisumboðsmaðurin gongur eitt sindur fjálturskotin aftur og fram. -Man nakar fara at koma, tykist hon at hugsa



*Tingformaðurin, Finnbogi Ísakson og Hans Jacob Joensen, biskupur hava altíð tætt samstarv við tann til ein hvørja tíð sitandi ríkisumboðsmannin.*

## Vælumtókt

Og so koma gestirnir. Eftir lítlari løtu fyllir elitan innan føroyskan politikk, vinnu og andslív, saman við embætisfólki, stovurnar og ekkóið er horvið úr rúmunum. Samlað ljóðar prátið sum rumbul, men fokuserar tú oyrað, ein og tú ger við myndatólinum, so er mangt áhugavert at hoyra, og tú hoyrir beinanvegin, at Vibeke Larsen er ein virdur ríkisumboðsmaður.

Og knappliga, so fánar prátið burtur. Vibeka hevur sligið á glasið, og tíðuliga rørd, takkar hon fyri tíðina.

-Eg veit ikki um tað var við vilja, men eitt lá fast, tá eg kom til Føroya.. Eg visti einki um føroysk viðurskiftir, eg hevði ikki slitið skógvarnar á Christiansborg og eg hevði einki sum so havt við danskan politikk at gera. Eg kom til Føroyar í eini ógvuligari turbulentari tíð, hvar øðin í fólkinum var stór aftan á kreppu og bankakanning. Tað hevur verið hart, og mangan hevur kókað inni í mær, men eg havi megnað at stýrt tunguni og eri ikki lopin framav í orðaleiki. Um vreiðin onkuntíð hevur gingið útyvir køttin heima ella okkurt annað skal vera ósagt, segði Vibeke Larsen.

Og løgmaður takkaði henni fyri hennara arbeiði. Løgmaður hevði góð orð at bera Vibeku.

-Eg haldi, at Nyrup valdi rætt, tá hann valdi teg sum ríkisumboðsmann. Tú hevur dugað væl og samstarvið okkara millum hevur verið framúr gott, segði løgmaður, Anfinn Kallsberg og handaði henni eina gávu frá landsstýrinum. Ein køkuknív og gaffil, skeft við ibenholt, við inløgdum beinmyndum av áttamannafari, grind og tí sum tí tilhoyrir. Føroyskt listahandverk í odd og egg.

Úti í gongini liggja gávurnar og á hvítum seðlum góðynskini. Her liggja gávur og blómur frá vinnulívi, frá tryggingarfeløgum og bankum, frá politikkarum, sum ynskja framhaldandi samband við Danmark. Frá politikkarum, sum hugsa um loysing tað eygað er opið og droyma um sama evnði, tá náttin doyvir sinnið.

Og sjálvsagt var eisini tosað um framtíðina hjá Amtmannsborgini. Semja er um, at hendan byggiperla er framtíð lagað á donskum hondum, antin sum býli hjá okkara ríkisumboði ella sum donsk ambassada í Føroyum, alt velst um hvørja ríkisrættarliga støðu føroyingar velja í framtíðini.



*Frá vinstru nnan, skatturin og fíggjarin. Mohr, Lamhauge og Astrup.*


**Føroya størsta úrval av pakkitilfari úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

**Vit útvega eisini:**
Plastbakkar • Pakkibond • Tape • Merkir • Etikettir
Knívar • Kitlar • Húgvur • Handskar • Svintur
Ymisk tól til ídnaðin • Reingerðisevni • Íbindingarevni
Plattar • Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

... sjálvandi til besta prísin !!

FARPACK

Staravegur 5 • P.O. Box 3099 • 110 Tórshavn • Faroe Islands
Telefon 35 30 00 • Fax 35 30 10 • e-mail: farpack@farpack.com
**www.farpack.com**




# Stóra Pakkhús letur upp leygardagin

**Nýggja mentanarhúsið, Stóra Pakkhús í Vági, letur upp leygardagin. Arbeitt hevur verið seinasta árið við at seta í stand og ummvæla. Umframt, at fólk fáa høvi at síggja húsini leygadagin, verður eisini skipað fyri uppboðssølu av seyði**

MENTAN

*Dagfinn Olsen*

Virksemið hevur verið nógv framvið Garðabrúnni í Vági, síðani hon varð umvæld og tikin í nýtslu aftur fyri nøkrum árum síðani. Partur av hesum virkseminum hevur stavað frá, at Stóra Pakkhús, ið stendur beint við brúnna, hevur verið sett í stand, sum partur av stórari ætlan um mentanarhús.

Hetta er nú veruleiki og Stóra Pakkhús, nýggja mentanarhúsið, letur upp leygardagin. Tá verður opið hús, har fólk fáa høvi at síggja Stóra Pakkhús.

Byrjað verður klokkan 15, tá eitt sindur verður sagt um ætlanirnar við nýggja mentanarhúsinum. Eftir hetta eru kaffi og køkur at fáa, umframt at okkurt sjálvsagt eisini er til børnini.

Á skránni er eisini uppboðssøla av seyði, sum Stóra Pakkhús hevur fingið til gávus í samband við, at húsið er liðugt og nú letur upp. Øll eru vælkomin at vitja í Stóra Pakkhús leygardagin, siga fyrireikararnir.



*Stóra Pakkhús, nýggja mentanarhúsið, letur upp leygardagin. Tá verður opið hús, har fólk fáa høvi at síggja Stóra Pakkhús*
*(Mynd: D. Olsen)*

# Skótar á drúgvari gonguferð

**Skótarnir í Vági skipa í dag fyri drúgvari gonguferð, har Suðuroyggin nærum verður gingin úr enda í annan. Skótar úr Fuglafirði verða við á ferðini**

FRÍTÍÐ OG NÁTTÚRA

*Dagfinn Olsen*

Tað er ikki smávegis, sum skótarnir í Vági hava set sær fyri, tá teir í morgun settu kós í hagan. Ætlanin er at ganga úr Sandvík til Vágs og at liggja nátt í tjaldi, um veðrið loyvir tí.

Í morgun tíðliga fóru skótarnir avstað úr Sandvík. Ætlanin er ikki at skunda sær. Patvís, tí ungfólk eru við og partvís fyri ikki at leggja ov nógv fyri, nú fólk ikki eru so von at ganga í haganum longur. Heldur verður dentur lagdur á at hava ein góðan og hugnaligan gongutúr.

Ætlanin er at sova í tjaldi á leiðini við Øravík, um veðrið loyvir tí. Hildið verður so fram leygarmorgunin, tá kósin verður sett móti Porkeri. Har verður viðføri heintað og so halda skótarnir leiðina til Vágs eftir koyrivegnum.

Við á ferðini eru eisini skótar úr Fuglafirði, ið hoyrdu um ætlaðu ferðina og hildu hugskotið vera áhugavert. Teir komu til Vágs í gjár og hava ligið nátt í skótahúsinum í Vági, áðrenn drúgva túrin, sum byrjaði í morgun, fríggjamorgun, árla. Umleið klokkan sjey varð farið úr Vági til Sandvíkar við bili, men síðani vóru bert beinini at líta á, á heimferðini til Vágs.

# Ivory í Føroyahúsinum

**Ivory spælir til cafékvøld í kvøld í Keypmannahavn**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*

Í kvøld verður cafékvøld í Føroyahúsinum í Keypmannahavn. Tað er bólkurin Ivory, ið fer at spæla. Bólkurin er til tiltakið mannaður við Mikael Blak, Brandi Jacobsen, Leivi Thomsen og Eivør Pallsdóttir. Kostnaðurin fyri at koma innar er 50 krónur.







Í hesi vøruskrá, sum júst er borin í hvørt hús í Føroyum, fært tú hugskot og íblástur til tína skrivstovu.

Fríggjadagin og leygardagin verður sølustjórin hjá Dencon at hitta hjá IDÉ-møblum.

Kom inn og fá eitt prát og lat okkum geva tær eitt uppskot. Vit teldutekna tína skrivstovu og eisini ber til at síggja tekningina í 3D.

IDEmøbler
FØROYA MØBLASØLA
Uppi á Hálsi, Tórshavn, Tel 35 46 80